Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Grímur Sundstein, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu-og samferðslumálum

Evni: Tunnil til Vestmanna

Spurningar:

1. Nær verður væntandi farið undir at bora tunnil til Vestmanna ?
2. Hevur landsstýrismaðurin saman við landsstýrinum gjørt nakra endaliga raðfesting av, hvørjir tunlar skulu gerast næst ?
3. Fer arbeiðið at fyrireika og projektera tunnil til Vestmanna at halda fram komandi árini, hóast ongir pengar eru játtaðir á fíggjarlógini til Vestmannatunnilin fyri 2025 og frameftir ?

Viðmerkingar:
Í uppskoti til fíggjarlóg fyri 2025, stendur m.a. at '*Vestmannatunnilin verður fyrireikaður og projekteraður. Tá Tjørnuvíkartunnilin er liðugur, verður eftir ætlan farið undir Vestmannatunnilin.*'

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2025, er 1 mió. kr. sett av til tunnil til Vestmanna í 2024, men onki komandi árini! Til samanberingar hevði undanfarna samgonga í sínum seinasta fíggjarlógaruppskoti játtað 75 mió. kr. til Vestmannatunnil í 2025.

Nú arbeiðið at gera tunnil til Tjørnuvíkar er farið í gongd, kann væntast at ferð eisini kemur á fyrireikingarnar til Vestmannatunnilin. Men hóast greiða setningin um, at '*Tá Tjørnuvíkartunnilin er liðugur, verður eftir ætlan farið undir Vestmannatunnilin.'*, kann tað tykjast sum ein andsøgn, at ongir pengar eru játtaðir á fíggjarlógini til hendan tunnilin komandi árini.

Farleiðin til Vestmanna er góð, tá veðrið er gott, men tíverri er ov ofta ikki koyrandi í vetrarhálvuni fyri vindi og kava.

Umframt vestmenningar og avbygdarfólk koyra eisini bussar við skúlanæmingum, tangabilar ísv. aling, lastbilar við farmi og framleiðslu, umframt á leið 40.000 ferðafólk, ið ferðast um Høgareyn í summarhálvuni.

Fyri at fáa greiðu á støðuni viðvíkjandi Vestmannatunlinum verður hesin fyrispurningur settur.

Brot úr fíggjarlógini 2025 – s.118

Virksemisyvirlit: 10 Nýgerð av landsvegum						
	2022	2023	2024	**2025**	2026	2027
	R	R	J	**F**	Æ	Æ
30. Tunnil til Vestmanna	1.067	642	1.000	**-**	-	-

Á Løgtingi, 4. november 2024

Grímur Sundstein